

# Føstufressarnir

Í HESUM DØGUM VENJA **TERJI** OG **FØSTUFRESSAR** DÚGLIGA TIL STÓRU **ÚTGÁVUKONSERTINA**, SUM VERÐUR UM EINA VIKU. **TERJI RASMUSSEN**, SUM HEVUR SPÆLT SAMAN VIÐ NÓGVUM **TÓNLEIKARUM**, HELDUR, AT TAÐ ER NAKAÐ HEILT SERLIGT AT SPÆLA VIÐ **FØSTUFRESSUM**



TÓNLEIKUR

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Hóast eitt hálvt ár er ligið, síðani fløgan Tvey hjá Terja og Føstufressum kom út, verður útgávukonsertin hildin um eina viku. Tá fara Terji og hansara føstufressar at hava konsert í Norðurlandahúsinum.

- Tá ið okkara fyrra útgáva kom út fyri 21 árum síðani, spældu vit útgávukonsertirnar, áðrenn tónleikurin kom á gøtuna. Útgávan bleiv eitt sindur seinkað, og tí vóru konsertirnar hildnar, áðren fólk høvdu kunnað keypt tónleikin. Hesaferð spæla vit útgávukonsertina eitt hálvt ár eftir, at fløgan kom út, sigur Terji Rasmussen við einum smíli.

Orsøkin til, at útgávukonsertin nústani verður hildin, er, at tað ráddi um at finna eina tíð, har allir tónleikararnir fingu verið við, og har Norðurlandahúsið var tøkt. Tí bleiv tað til fríggjakvøldið í næstu viku.

## Heilt serligt

Terji Rasmussen hevur í sínum drúgva tónleikalívi spælt í fleiri bólkum og saman við nógvum tónleikarum, men fyri hann er tað nakað serligt at spæla við Føstufressum.

- Teir eru framúr góðir tónleikarar hvør sær, og tá ið teir spæla saman, er tað nakað heilt serligt. Tað ber ikki